# handVERKARIN

2. ÁRSFJÓRÐINGUR 2007 BLAÐ NR. 23 HAVNAR HANDVERKARAFELAG



# Lærlingar fáa nú eisini eftirløn

Semja er gjørd millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag øðrumegin og Landsfelag Handverkaranna og Føroya Handverkarafelag hinumegin um, at lærlingar, fevndir av lærlingasáttmálanum, sum er gjørdur felaganna millum, og sum kom í gildi 1. oktober 2005, fáa 3% í eftirløn frá 1. januar 2007 at rokna.

Umframt hesa eftirløn fáa lærlingarnir eisini eftirløn sambært grein 8 í nevnda sáttmála.

Henda semja hevur við sær, at frá 1. januar 2007 rindar arbeiðsgevarin 4,5% í eftirløn til lærlingar.

Í tí sambandi verður heitt á lærlingarnar um beinanvegin at skráseta seg sum lim í einum av teimum lokalu handverkarafeløgunum.

## SJÚKRAGRUNNURIN BATI

Sjúkragrunnurin Bati er bert fyri tímalønt. Mánaðarlønt fáa løn, tá tey eru sjúk. Umsóknin skal vera Bata í hendi í seinasta lagi 10. sjúkradagin. Handverkarin rindar 15 oyru og meistarin rindar 30 oyru av hvørjum tíma í grunnin.

## EFTIRÚTBÚGVINGARGRUNNUR

Handverkarar og meistarar gjalda 10 oyru av hvørjum tíma í eftirútbúgvinggrunnin VITIN. Grunnurin letur stuðul, tá handverkarar fara á skeið. Í fyrsta umfari fæst vanliga dagpeningur frá skúlanum. Hetta verður endurgoldið eftir skeiðið. Ferðaútreiðslur verða aftgoldnar sambært kvittan fyri ferðaseðil/seðlar.

## LÍVSTRYGGING

Limir felagsins eru lívtryggjaðir. Ein treyt fyri at fáa útgjald er, at limagjald ikki er í eftirstøðu. Best er tí at gjalda limagjald við fastari flyting.

Umráðandi er at limir boða frá, tá broytingar eru í limastøðuni.

## LØNARSEÐLAR, EFTIRLØN V.M.

Saman við lønarútgjalding skal vikuseðil fylgja við. Tað er umráðandi at handverkarin sjálvur fylgir væl við lønargjaldi og at eftirlønin er røtt (%) og at hendan verður flutt til Grunnin.

**Innihaldsyvirlit:** **síða**


| | |
|---|---|
| Johonnu Hansen til minnis | 3 |
| Sylverius Jacobsen, smiðjuformaður | 4 |
| Nýbygningurin Thor Alpha | 4 |
| Lærlingur og dómari við bronsumedalju | 5 |



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag · Sjúrðargøta 20 · Box 203 · 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Snæbjørn í Dali · **Umbróting og prent:** Pf. Einars Prent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.

**Avgreiðsla:** Yrkadagar frá kl. 9 til 12 · Hósdag er eisini avgreiðsla frá kl. 15 til 18.
Tel. 35 48 00 · Fax: 35 48 01 · Teldupostur: handverk@handverk.fo. · www.handverk.fo

# Johonnu Hansen til minnis

**Sunnumorgunin 22. juli andaðist Johanna Hansen – brádliga, einans 66 ára gomul. Á sumri í fjør valdi Johanna at gevast sum dagligur leiðari hjá okkum í Havnar Handverkarafelag.**



Johanna skuldi nú nýta sítt otium, saman við unnusta sínum. Johanna var trúgv; hóast hon hevði lagt arbeiði frá sær, var hon javnan inni á gólvinum hjá okkum; og tá fingu vit altíð eitt hugnaligt prát saman.

Mikudagurin 18. juli var ein av hesum døgum.

Tá var Johanna inni á gólvinum, sum hon plagdi, men ikki vistu vit, at hetta var seinasta vitjan hennara hjá okkum.

Tá tóktist hon at vera heilt væl fyri; og fortaldi m.a. at hon gleddi seg til at sleppa út at ferðast saman við Jonny í summar. Men nú vóru brádliga boð eftir henni.

## Pápin doyði ungur

Johanna var longu í 1940 fyri tí vanlagnu – einans 6 vikur gomul – at missa pápan, sum var kendur og væl umtóktur skipari. Pápin, Joen Carl Danielsen, av Fløtunum á Strondum, varð føddur í 1912, so hann var ungur at fara.

## Sanna á Høvdanum

Móðir Johonnu, Sanna á Høvdanum, er í dag 94 ára gomul. Vit sum eru yngri duga ikki rættuliga at fata, hvussu ein ung mamma í 1940 megnar at fóta sær, tá tilveran gjørdist so ófatiliga trupul. Tí var eisini mangan lætt at skilja, hvussu stóra fyrimynd Johanna hevði í móðir síni. Og ivaleyst lá eisini her ein partur av orsøkini til, at luturin hjá henni ongantíð lá eftir. Vit sum

*… framhald á síðu 16*

*Sylverius Jacobsen:*

# Sylverius Jacobsen, smiðjuformaður



**1. august í 1992 varð Sylverius Jacobsen settur í starv sum smiðjumeistari á Skála Skipasmiðju. Tá hevði hann í fleiri ár verið formaður í Skála Handverkarafelag.**

Men av tí, at hann metti, at tað kundi vera óheppið, at smiðjumeistarin á Skipasmiðjuni og formaðurin í Skála Handverkarafelag var sami maður, legði hann formansstarvið í handverkarafelagnum frá sær.

*… framhald á síðu 20*

# Nýbygningurin Thor Alpha




**Í góðveðrinum leygardagin 21. juli varð fyrra skipið, ið Thor í Hósvík letur byggja á Skála Skipasmiðju, sjósett.** **Framhald á s. 27.**

*Ransin Napoleon Djurhuus:*

# Lærlingur og dómari við bronsumedalju

**Ransin hevur frá barnsbeini havt serligan tokka til fótbóltin og hevur roynt seg á besta liðnum hjá HB í Formuladeildini. Men í dag heldur hann seg meira til dómara- og málarafakið.**





Ransin Napoleon Djurhuus er havnarmaður við stóra H.

Hann hevur verið næmingur í Tórshavnar Kommunuskúla í 10 ár; har hann tók 10. floks prógv í 1998.

Tá var tað, at hann fekk hug at royna seg á einum ítróttarskúla uttanlands. Hann søkti inn á ein danskan eftirskúla, sum hevði fótbólt sum høvuðslærugrein. Hetta var ein sonevndur fótbóltsháskúli í Grenå í Danmark. Og glaður var hann, tá hann fekk bræv frá skúlanum, um at hann var upptikin til skúlaárið 1998-1999.

## Fótbóltsskúlin

Høvuðslærugreinin á skúlanum í Grenå var fótbóltur, so fótbólturin fylti nógv hesa tíðina; tað fevndi um teknikk, teori, taktikk og praktiskan fótbólt. Hvønn dag vóru tvær fótbóltsvenjingar.

Ein venjing var fyrrapart frá kl. 10.30 til 12, og tann seinna frá kl. 16.30 til 18.

Men tað vóru eisini aðrar lærugreinir á skúlanum: Danskt, rokning, enskt, alisfrøði, evnafrøði og fyrstahjálp.

Hetta árið rann tíðin skjótt. Ransin dámdi sera væl á skúlanum, og í juni 1999 var skeiðið lokið. Næmingarnir fingu allir ummæli frá skúlanum; í hesum verður m.a. tikið soleiðis til: „Ransin er meget selvstændig og moden. Han har arbejdet godt og konsentreret med sine opgaver i skolen.

Han har meget gode evner for skolefagene. Han er posetiv, munter og venlig."

## HF útbúgving og arbeiðsroyndir

Á sumri 2001 fekk hann hug at taka eina miðnámsútbúgving, og fór tí undir HF lestur í Hoydølum, har hann tók HF prógv í 2003.

Í summarfríðtíðini í 2000, 2001 og 2002 arbeiddi hann sum málari hjá Málameistarunum Falkenberg.

Tá hann var liðugur við eftirskúlan hevði hann hug at royna, hvussu tað er at arbeiða í einum Frítíðarskúla. Tað dámdi mær stak væl, sigur Ransin, eg arbeiddi sum hjálparfólk í einum frítíðarskúla í 1 1/2 ár. Men so fekk eg ein møguleika at arbeiða sum timburmaður; tað var fyrst í 2001. Tað var nakað heilt annað; tá lærdi eg nógv, sum seinni er komið mær til góða. Tað kann eg fyri so vítt eisini siga um frítíðarskúlan. Men tíðin sum timburmaður var stutt, einans 6 mánaðir.



*Ransin tók HF prógv í 2003.*

## Í málaralæru

Ransin greiðir nú frá, at tað var nærmast rein tilvild, at hann fór at læra til málara. Tað komst av, at Benny Falkenberg spurdi meg um eg ikki hevði hug at koma í málaralæru hjá teimum. Eg hevði jú arbeitt fleiri stutt og longri tíðarskeið hjá teimum – serliga um summari, tá eg gekk í skúla.

Málarameistararnir Falkenberg bjóðaðu mær góðar treytir, tað var helst grundin til, at eg tók av. Eg visti, at tað var stórur tørvur á málarum. Tað hava verið alt ov fáir málarar í nógv harrans ár. Tað er eisini nakað serligt at fara í málaralæru, tí man skal av landinum til Danmarkar at ganga í tekniskum skúla. Teknisku skúlarnir í Føroyum taka ikki málaralærlingar inn, tí má man av landinum.

Læran byrjaði 17. mars 2004. Eg fór alt fyri eitt til arbeiðis, og arbeiddi í fyrsta umfari einar 7 mánaðir. Tá var eg 22 ára gamal, leggur Ransin afturat.

## Fyrsta tíðin

Í oktober/desember 2004 var eg í Danmark og tók tað fyrsta skúlaskeiðið, sum var 10 vikur.

Eg gekk í tekniskum skúla í Gladsaxe. Hetta var ein stórur skúli, men mær

dámdi væl. Í desember var fyrsta skúlaskeiðið liðugt, og eg kom heim aftur til jóla 2004.

Tað var spennandi at koma aftur til arbeiðis. Eg hevði sjálvandi lært eitt sindur av hvørjum, og slapp at royna meg við nýggjum uppgávum.

## Í Danmark í 2005 og 2006

Aðru ferð eg fór í tekniska skúla í Danmark var í oktober 2005. Tað var á sama skúla, og skúlaskeiðið var eisini 10 vikur.

Eftir skúlagongdina kom eg heim aftur í desember og byrjaði so aftur at arbeiða.

Eg lærdi sjálvandi meira og meira og fekk størri avbjóðingar, og tað dámdi mær stak væl.

Tað triðja skúlaskeiðið var á sama skúla í 10 vikur. Tað var í oktober/-desember 2006.

## Dómari

Meðan vit sita og práta er sjónvarpið frá. SVF sendur ítróttartíðindi, so vit hyggja eftir onkrum broti inn ímillum. Men so brádliga reisur Ransin seg upp úr sofuni, og sigur avgjørdur „Hatta er skomm fyri føroyskan fótbólt".

Sjónvarpið sendir myndirnar umaftur, og nú síggi eg, at ein venjari loypur á ein leikara og slær hann beint í andlitið.

Brotið, sum SVF sendur, er frá einum dysti í Formuladeildini suðuri í Vági ímillum VB/Sumba og EB/Streym.

Ransin er sjálvur dómari í Formuladeildini.

Eg ógvist eisini við, og havi hug at spyrja, hvussu slíkt kann henda í Føroyum. Ransin er skjótur at svara, at hatta kann í grundini henda, hvar sum helst.



*Ransin og Gunvá vænta sær tvíburðar fyrst í september.*

Vit eru ikki øðrvísi enn onnur, leggur hann afturat.

## Vandamikið at vera dómari

Vit sita eina løtu og siga onki. So hyggur Ransin uppá meg, og sigur róliga, at hatta er nakað, sum ein dómari veit kann henda. Tað nyttar onki at gera ein fótbóltsvøll til eitt fongsul, tað hevur man roynt í øðrum londum, men tað vísir seg, at tað kann henda kortini, og tað er líka mikið, hvussu gott man heldur, at eitt eftirlit kann vera.

Hetta merkir ikki, at vit onki skulu gera, sigur Ransin avgjørdur. Ein slík ger

… framhald á síðu 9

# TEKNISKI SKÚLIN

TÓRSHAVN

- ✓ *Handverksútbúgvingar*
- ✓ *Støðisútbúgving*
- ✓ *Yrkisakademiútbúgvingar*
- ✓ *Skúlaheim*



*Marknagilsvegur 75 • Postboks 3239 • 110 Tórshavn • telefon 308050 • telafax 308051*

*www.tst.fo • tst@tst.fo*






## Lyklaklár fígging og trygging til bilin

Ætlar tú at keypa bil, bjóða vit tær fígging og trygging um eina leið. Tú fert beint inn á bila søluna, har tú fært landsins bíligastu og skjótastu fígging beinanvegin. Í somu vending avgreiða vit tryggingina. Tú fært lykilin og koyrir avstað.

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn,
Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

*- so ert tú tryggari*

*… framhald frá síðu 7*

skal sjálvandi fáa fylgjur. Vit vita, at vanliga ger politiið onki við málið, um tann, sum verður álopin ikki meldar tilburðin.

Men tað forðar ikki øðrum instansum at taka málið upp, so tað kann fáa fylgjur. Men mest av øllum haldi eg hetta vera skom fyri Føroyar, sigur Ransin avgjørdur.

## Ábyrgd og vandi

Ransin er púra avkláraður. Hann letur meg vita, at tað liggur ein stór ábyrgd, og samstundis eisini ein ávísur vandi á herðunum á einum fótbóltsdómara. Dómarar vita, at hetta er nakað, sum kann henda og, at teir mugu vera fyrireikaðir. So løgið tað ljóðar, so er hetta nakað, sum við noyðast at taka upp á okkara kropp.

Ransin hevur tikið fótbóltsdómaraprógv á skeiðum, sum Fótbóltssambandið hevur skipað fyri.

Hann hevur eisini drúgvar royndir í fótbóltsheiminum; hann hevur m.a. verið ungdómsvenjari í 10 ár, og hevur spælt fótbólt á høgum støði í Formuladeildini. Hann var á besta liðnum hjá HB í 2000, har hevur hann spælt 10-12 dystir. Men Ransin er givin við fótbóltsspælinum á høgum stigi, hann sigur at tað riggar ikki bæði at spæla og døma í Formuladeildini, man má velja annað.

Tað merkist, at her hava vit ein mann, sum hevur hugsa seg væl um.

*… framhald á síðu 12*



*Lærumeistararnir, Benny og Tommy Falkenberg, vóru í Danmark og handaðu blómur, tá Ransin hevði staðið sveinaroyndina og fingið bronsumedalju fyri sveinatykkið.*


Ein góð byrjan
Er grundarlagið í lagi? Timburhandilin
og 2x3 ynskja at bjóða tær eina góða
byrjan við einum breiðum og góðum
úrvali av Mascot arbeiðsklæðum
og DeWALT amboðum.
TIMBUR HT TILFAR HANDILIN


Nýtið bara bestu útgerð umborð á føroyskum fiskiførum
VARTA
Battariir Til Øll Endamál
Fartelifonir
Hoyri Apparatir
Ur og mangt annað
Eisini hava vit øll vanlig battariir
Heil- og smásøla, landsins bestu
battariir, og landsins bestu prísir
PÓLAR



Netbóking
keyp tína ferð tá tað passar tær...
Tað er lætt at keypa ferðaseðlar frá Atlantic Airways.
Far inn á atlantic.fo og bílegg tín ferðaseðil.
Tað einasta, tær nýtist, er eitt gjaldkort.
Gjaldkort, sum kunnu nýtast: Dankort/VISA, VISA,
MasterCard, Diners Club.
ATLANTIC AIRWAYS
Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum
www.atlantic.fo
www.sansir.fo

*… framhald frá síðu 9*



*Her sæst ein partur av sveinastykkinum.*

## Sveinastykkið

Ransin gjørdi sveinastykkið í Gladsaxe í Danmark í juni mánað í ár. 34 lærlingar fóru upp samstundis á skúlanum, og fingu somu uppgávu. Teir fingu hvør sítt rúm, sum vóru innrættað til endamálið.

Ransin greiður frá, at lærlingarnir fingu nágreiniligar tekningar av rúminum; har var alt við: longd, breidd, areal, gólv, veggir, loft, vindeyga og hurð v.m.

Ein veggur skuldi tapeserast, tveir skuldu hava glasfilt og máling. Loft, vindeyga og hurð skuldi lakerast við glans 60. Lærlingarnir skuldu sjálvir taka støðu til, hvat tilfar skuldi brúkast og, hvat slag av máling teir ætlaðu at brúka.

Teir flestu valdu at brúka Beckers og Flügger máling. Ransin valdi Sigma máling, tað er eitt merki úr Hollandi, sum honum dámar nógv best, so tað ivaðist hann ikki í. Onkur av danskarunum valdi eisini Sigma, men teir vóru fáir, greiðir hann frá.

7 arbeiðsdagar vóru settir av til sveinastykkið. Vit kundu arbeiða so nógv, sum vit høvdu hug til millum kl. 8-16, men bara 7 arbeiðsdagar.

## Fyrireiking

Ransin var væl fyrireikaður til sveinastykkið. Tað síðsta skúlaskeiðið var í apríl/mai í ár; tað var 5 vikur. Tá fekk hann høvi til at seta seg inn í alt, sum hevði við sveinaroyndina at gera.

## Hart og kontant

Ransin nevnir eisini, at kanningar vísa, at ein dómari í einum fótbóltsdysti vanliga tekur umleið 600 avgerðir í 90 minuttir. Tað er eitt stórt tal, og sjálvandi fella ikki allar í góða jørð.

Ein dómari má eisini klára at taka tað man kallar „ópoppulerar" avgerðir. Og fótbóltsdómarar mugu eisini tola at fáa ófólkaligar viðmerkingar frá áskoðarum, – tað er eisini ein partur av spælinum.

Og so leggur hann afturat, „tú kann gott skriva, at vit í Føroyum hava alt ov fáar dómarar, og tí er neyðugt at fleiri fara undir at taka dómaraútbúgving".

Hetta fær meg at hugsa, at kanska er arbeiði hjá einum fótbóltsdómara í Føroyum so krevjandi og ótakksamt, at alt ov fá tíma at vera við í spælinum.

Sveinastykkið skuldi dømast á seks økjum:

1) Heildarmynd av básinum.
2) Litroyndir
3) Lakera plátu, hon skuldi vera sløtt og vøkur við glans 90.
4) Grundleggjandi arbeiði í sambandi vit spartling, og uppsetan av glasfilt og tapet.
5) Lakkarbeiði inni í básinum.
6) Gera model við litum í A3 stødd á pappír.

## Próvtøl og bronsumedalja

Síðani 1989 hava 89 málaralærlingar fingið bronsumedalju í Danmark. Hesaferð fingu tveir bronsu, Ransin var annar. Fyri at fáa bronsu skal miðalkarakterurin vera millum 10 og 11. Silvur krevur at miðal liggur ímillum 11 og 12. Eg skilji á lagnum, at Ransin ikki hevur hug at gera ov nógv burturúr hesum úrslitinum, sum eg haldi vera so flott.

## Sonurin William

Meðan vit hava sitið og práta hevur sonur hansara, William, spælt og hugað sær á gólvinum. Hann er ikki farin til gongu enn, men grulvar óført aftur og fram. So einaferð síggi eg, at hann setur beina kós móti pápanum. Hann veipar við ørmunum, og sær eitt sindur álvarsamur út. Hann sigur eisini okkurt, sum eg ikki skilji, men tað ger Ransin. „Å súrepli", sigur Ransin. Lítli alvin klappar við hondunum, og Ransin loypur út í køkin, og kemur aftur við einum súrepli, sum hann setur seg at skera soninum. Nú stendur William við stórum brosi og bíðar spentur.

Hann fer skjótt til gongu, sigi eg. Hann er bara 13 1/2 mánað, svarar Ransin, hann eitur William, eftir abbanum, verfaðir, Knút William Gray.



*Gunvá Gray og sonur teirra William.*

## Sveinagildið fyri framman

Hóast Ransin hevur gjørd sveinastykki í juni 2007, so eru nakrir dagar sum lærlingur eftir. Men 17. september í ár er lærutíðin komin at enda, og høvið verður at halda sveinagildi.

Annars hevur Ransin í seinastuni verið við í fleiri stórarbeiðum t.d. í Tofta Skúla, í SMS (uttan og innan) og nú fyri stuttum gjørdu teir arbeiði í nýggja Løgtingsbygninginum liðugt.

Tá vit, at enda spyrja hann um tað er nakað serligt málaraarbeiði honum dámar serliga væl, sigur hann við einum smíli: „Onki er so lekkur, sum at koma inn í eini nýggj, ruddilig, rein og nosslig sethús. Tá er tað ein stuttleiki – hjá málaranum – at fara til verka."

Nú er tíð at takka fyri prátið, – og skoyta uppí, at 9. september í ár verður Ransin 26 ára gamal.

HÚSASMÍÐ
Finnur Simonsen
tel. 31 45 49 - 51 45 49 - fax 31 83 81

Málarameistararnir
FALKENBERG
Tlf. 21 31 51 Tommy
Tlf. 21 31 54 Benny



SKIPASMIÐJAN
www.faroeyard.fo




# Lat heldur okkum gera tað...

Húsavarðartænastan er altíð klár. Vit gera tímasáttmálar ella heildarloysnir til virkir og stovnar, har vit altíð eru til reiðar at gera umvælingar ella aðrar uppgávur – alt samdøgrið.

**...húsavarðaarbeiði**
**...alt snikkara- og timburarbeiði**
**...umvælingar**
**...sethúsabygging**

Tel 565589 - 565590
hvt@kallnet.fo, Fax 315590

**Húsavarðartænastan**

**Ognað tær tín egna húsavørð**

Vit veita ráðgeving í tryggum og hugnaligum umhvørvi

SUÐUROYAR SPARIKASSI
*www.sparsu.fo, Tel 35 98 70*




*Marita í Brekkunum, skrivstovukvinna*


*Petur Juul Jacobsen, dagligur leiðari*


*Anette Davidsen, skrivstovukvinna*

*… framhald frá síðu 3*

komu at kenna og arbeiða saman við Johonnu eru henni takksom.

## Arbeiddi fyri fýra feløg

Johanna kom til Havnar, tá hon byrjaði á Preliminærskúlanum í 1954, har hon tók prógv í 1956.

Og longu árið eftir byrjaði drúgva starvstíð hennara fyri sjóvinnufeløgini í Føroyum. Fyrst Føroya Fiskimannafelag, síðani Føroya Skipara- og Navigatørfelagið og Føroya Maskinmeistarafelag.

Og tíðarskeiðið 2000-2005 var Johanna dagligur leiðari hjá Havnar Handverkarafelag.

## Fiskimannafelagið

Í 1957 varð Johanna sett í starv á skrivstovuni hjá Føroya Fiskimannafelag. Fimtiárini eru tiltikin vánalig, og eins og alt samfelagið var meint rakt mundi eisini mangan standa á hjá Fiskimannafelagnum hetta tíðarskeiðið.

Hesa tíðina arbeiddu nógvir føroyingar í Íslandi, og ein heilur hópur fekk tá løn ígjøgnum Fiskimannafelagið.

Tá vóru ikki nógvir hentleikar sum nú á føroyskum skrivstovum.

## Alt við hond

Fjarrit kom úr Íslandi til Føroya Fiskimannafelag við nøvnunum á teimum, sum skuldu hava løn, og hvussu nógvar tímar hvør einstakur hevði arbeitt.

Tá var so uppgávan hjá Fiskimannafelagnum at rokna út, hvussu nógv hvør skuldi hava og senda peningin við postávísing. So at siga allur peningur var tá fluttur við postávísing, tað var mest sum einasti møguleikin tá í tíðini. Og størsta upphæddin, sum kundi flytast við eini postávísing var 1.000,- kr.

## Stórar broytingar

So har vóru nógvar postávísingar at skriva, mangan eisini fleiri til sama mann, – onkur fekk tríggjar, annar kanska 4 og fleiri postávísingar. Allar vóru tær skrivaðar og sendar sama dag. Ta ábyrgdina hevði Johanna, og tí var eisini hetta arbeiði í góðum hondum og røkt til fulnar.

Nú er onki arbeiði av slíkum slag eftir. Peningur verður fluttur við teldu beinleiðis inn á konto hjá lønmóttakara. Tað arbeiði fekk hon eisini prógvað, at hon dugdi til fulnar.

Eftir at Johanna var gift, fór hon heim at arbeiða, meðan børnini vóru smá.

Í styttri tíðarskeið var hon

kortini til arbeiðis hjá m.a Zaharias Bech, snikkarameistara, og hjá Árna Jensen, sum hevði Teppihandilin í Tórsgøtu í Havn.

## Skiparar og maskinmeistarar

Í 1980 fekk Johanna starv hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagnum, sum tá høvdu skrivstovu saman í bygninginum hjá Havnar Timburhandli á Eystaru Bryggju.

Feløgini fluttu skrivstovuna í 1982 frá Timburhandlinum til bygningin hjá Svend Krosstein, Yviri við Strond 3.

Tey fyrstu árini var hon einsamøll á báðum skrivstovunum, men arbeiðið vaks nógv hesi árini, og frá 1990 arbeiddi hon burturav fyri Maskinmeistarafelagið.

## Avbjóðingar heldur enn forðingar

Hjá hesum báðum feløgunum var nógv arbeiði av at dagføra limalistar og samskifta við limirnar. Harumframt skuldi limagjald krevjast inn, og tað var ikki altíð lætt. Tað kravdi bæði tíð og orku, og var mangan drúgt.

Tað var eisini í hesum tíðarskeiði, at teldan gjørdist eitt alt meira vanligt skrivstovuamboð. Og sum á so mongum øðrum økjum, var heldur ikki her nakar trupulleiki hjá Johonnu. Hon hevði serlig evni til at síggja avbjóðingar heldur enn forðingar. Tað er ein eginleiki, sum hevur sera stóran týdning, ikki minst fyri tey, sum man hevur dagligt samskifti við.

## Ein sera virkin kvinna

Johanna var á mangan hátt ein sera virkin kvinna, og hon hevði eisini fleiri áhugamál og frítíðarítriv.

Mangan var áhugavert at hoyra hana siga frá teimum mongu ferðunum, hon hevði verið í øðrum londum og ferðast. Serligan tokka hevði hon til Skotland og Hetland.

Johanna hevði stóran áhuga í enska málinum, og tí er helst ikki neyðugt at siga, at eisini á hesum øki var hon stinn. Væl lá fyri hjá henni at samskifta á enskum, bæði skrivliga og munnliga og um øll lívsins viðurskifti.

## Hetland og Føroyar

Johanna var trúgvur gestur í Hetlandi, og har hevði hon nógv vinfólk. Síðani 1984 var hon – í fleiri førum meira enn eina ferð um árið – og vitjaði vinir og grannar fyri sunnan.

Á hesum øki var Johanna ein eldsál bæði fyri Hetland og Føroyar. Hon hevði mong áhugamál – so mong, at møguligt er ikki her at greiða frá øllum.

Tá tað snýr seg um kunnleika og áhugamál um onnur lond var Hetland hennara hjartabarn.

## Radioamatørur

Vit mugu kortini nevna hennara stóra áhugamál sum radioamatørur; tað gav henni so mangar góðar løtur og minnir.

Í hesum sambandi eigur at vera nevnt, at Johanna hevur tosað við fólk úr flest øllum heimsins londum, og tað sum gav henni henda møguleika, var virksemi hennara sum „radioamatørur" í meira enn 30 ár. Øll hesi mongu árini tosaði hon við sendara sínum við fólk um allan heim.

## Dagligi leiðari okkara

Í Havnar Handverkarafelag eru vit henni

… framhald á síðu 24



Jógvan Weihe

Vit seta krøv til dygdina

trygdarhjálmar
trygdarskógvar
og tey røttu klæðini

p/f Jógvan Weihe - Stiðjagøta 10 - tel. 35 38 97 - www.jogvan-weihe.fo



TÁ ALT SKAL PASSA SAMAN

HEILDARVEITING INNAN EL-INNLEGGING, RÁÐGEVING OG PROJEKTERING

- El-innleggingar
- Ljós og talvur
- EDV- & telefonnet
- Neyðstreymur til X-felt og teldur (No-break og diesel)
- Køling av X-feltum og teldurúmum (air condition og køliskipanir)
- Trygging av X-feltum og teldurúmum (atgongueftirlit, innbrotsávaring, eldávaring og eldsløkking)

SISERO 351800

ELECTRIC

Hoyvíksvegur 53 • 100 Tórshavn • Tel 35 12 20 • Fax 35 12 30 • lm@lm.fo • www.lm.fo

SAMDØGURTÆNASTAN SVARAR ALTÍÐ Á TEL 35 12 20




**AGA Føroyar - Føroya Gassøla**

- **Ídnaðargass:** Skeri- og sveisiamboð
- **Húsarhaldsgass:** Gassapparat, komfýrar, hitaovnar, gassgrýtur
- **Campinggass:** Kókibluss, hitaovnar
- **Gassbrennarar:** Til sveising av takpappi, lodding, svíðing
- **ESAB:** Elektrodir og sveisiútgerð

*- vit hava sølustøð kring landið*

Akranesgøta 2 · Postrúm 1088 · FO-110 Tórshavn
tel 315544 · fax 311706
e-mail: gassola@post.olivant.fo

*… framhald frá síðu 4*

## Árini runnin skjótt

Sylverius sigur, at hesi árini síðani 1992 hava runnið skjótt, og hann metur sjálvur, at nú er rætta løtan komin til at lata ein annan sleppa at royna seg. Men hann ætlar kortini ikki at leggja alt frá sær. Gongur sum ætlað, so verður hann at síggja sum vanligur sveinur á Skála Skipasmiðju eftir summarfrítíðina, og tað gleðir hann seg til.

## Ein vanligur arbeiðsdagur

Hjá einum meistara á eini skipasmiðju er nógv at halda skil á. Nú hann leggur frá sær hevur hann ábyrgdina av 34 monnum; tað eru 18 handverkarar og 16 lærlingar.

Tað sum er mest umráðandi er at planleggja væl, sigur Sylverius; hann plagar at siga, at ein vanligur dagur hjá honum byrjar altíð dagin fyri.

Man skal hava fingurin á pulsinum, og vita, hvussu langt hvør einstakur er komin. Og tað er umráðandi, at tilfar og amboð, sum skulu brúkast eru tøk, og at ongar óneyðugar forðingar stinga seg upp. Tað hevur nógv at siga, at tað er gott samstarv millum allar deildirnar á Skipasmiðjuni

Tað tíðina Sylverius hevur verið meistari hava umleið 70 lærlingar fingið sveinaprógv á Skipasmiðjuni.

## Nógv er broytt

Tað hevur ikki altíð gingið væl fíggjarliga á skipasmiðjuni á Skála. Nógvir ymiskir eigarar hava verið; teirra millum Skála Handverkarafelag, ið hevur sett nógvan pening í Skipasmiðjuna; sum allur er mistur. Fleiri fallitt hava verið, men síðan 1997 hevur friður og regluligt arbeiði verið á Skála Skipasmiðju.

Seinnu árini er nógv broytt, tá talan er um skipabygging í Føroyum.

Skipasmiðjurnar á Skála, í Havn og Vestmanna eru nú saman við F.J.M í Runavík í einum samtaki, sum Gunnari Mohr stjórnar.



*Torfinn Hansen, vinstrumegin, arbeiðir her við skerimaskinuna, saman við einum pólendingi.*

## Nýbygningur og nýggjar vónir

Sum nógv vita vóru nú mong ár liðin síðani ein nýbygningur var bygdur á føroyskari skipasmiðju. Tí var tað ein sera spennandi avbjóðing, tá Skipasmiðjan í fjør fór undir at byggja eitt supplyskip. Gongdin seinnu árini bendi á, at tað var vorðið ómøguligt at byggja skip í Føroyum. Tað vóru gingin so mong ár síðani vit

bygdu nýtt, at vit – snøgt sagt – høvdu mist tann førleika, sum krevst, tá talan er um sveising til nýbygning.

Og samstundis bendi mangt á, at vit ikki vóru kappingarfør í prísi.

Eg haldi at mong høvdu mist vónina um, at tað aftur fór at vera gjørligt at byggja stálskip í Føroyum.

Tí var tað heppið, at tað gjørdist møguligt at fáa samstarv í lag við eina skipasmiðju í Póllandi, sum kundi senda sveisarar til Føroya at hjálpa okkum við sveisingini.



*Sylverius, høgrumegin, tekur í hondina á Kára Weihe, sum nú er smiðjuformaður á Skála Skipasmiðju.*

Tá mest var at gera á Skála Skipasmiðju vóru um 150 handverkarar í starvi. Eina tíð var skipasmiðjan størsta arbeiðsplássið í landinum.

Sylverius nevnir, at hann minnist, at tað vóru millum 300 og 350 starvsfólk á Skipasmiðjuni.

Men so hevur ikki verið seinastu mongu árini.

## Samstarvið við pólendingar

Teir pólendingarnir, sum eru her og sveisa, gera eitt framúrskarandi arbeiði. Vit hava nógv at læra av teimum, sigur Sylverius.

Teir eru sera góðir handverkarar. Hvør einasta sveising verður væl slípað; hetta er so mikið væl gjørt, at vit ikki kundu gjørt tað betur. Teir taka eisini alt so væl upp eftir sær, teir eru so rudduligir.

## Útbúgving av sveisarum

Eg haldi, at vit hava brúk fyri góðum sveisarum í Føroyum, og tí áttu vit, at gjørt eina avtalu við hesar menninar, um útbúgving av føroyskum sveisarum. Meðan vit hava teir her, áttu vit at nýtt høvi til at fáa eina skipaða læru í lag.

Tað kundi væl verið at t.d. sjómenn, sum eru komnir eitt sindur upp í árini, kundu hugsað sær eitt fast arbeiði á landi. Tað kundi eisini verið, at ungir dreingir høvdu hug at roynt eina slíka læru.

## Samskifti

Skulu vit í holt við eina útbúgving, so krevur alt at vera væl lagt til rættis. Her hugsi eg eisini um tað málsliga. Teir flestu, sum hava verið her eru ikki væl fyri málsliga, tað eru einir tveir – tríggir, sum duga eitt sindur av enskum.

… framhald á síðu 26

Ídnaðar- og garaguhurðar
Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92

Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður
Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn

Henning Sørensen
MÁLARAMEISTARI
TEL. 31 47 87 & 21 89 31



VINDEYGUNI SIGA ALT



**HDYGD umfatar ymsar vørur:**
- vindeygu
- altanhurðar
- úthurðar

**Úr ymsum tilfari:**
- træ
- træ/alu
- plast

**Við ymsum funktiónum:**
- toppsving
- síðusving
- síðuhongd
- topphongd

**Við 10 ára trygd:**
- døgg millum rútarnar
- rotskaðum (treytað av at vit mála liðugt)
- at viðurin skjýtur seg og fer sundur í lamineringini
- funktiónsfeilum á besløgum

HDYGD
Í Geilini 2 | FO-385 Vatnsoyrar | Tel.: +298 332177 | www.hdygd.fo | post@hdygd.fo

REPROZ

**rør-tænastan**
Vatn-Hiti-Sanitet-Ventilatión

*Eyðfinn Hansen*
*í Geilini 5*
*FO-175 Kirkjubøur*
*Faroe Islands*
*tel./fax: +298 32 81 80*
*fartel.: +298 22 81 80*
*e-mail: eydfinnh@post.olivant.fo*

**elmek**
**v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn**
**tel 317352 · far 217700 · elmek@post.olivant.fo**
**Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl**

**BAXI KETIL**



BALTIC CS
18-25Kw

Sera orkusparandi ketil frá BAXI.

CE góðkendir.
DS/ISO 9001 góðkendir.

Við kappa til oljufýr

Ein tann mest orkusparandi ketil á føroyska marknaðinum.

Síggj kanningina
á www.sparolie.dk

**Tórshavn:**
Stiðjagøta 2 - Postboks 378
tel 30 93 10 - fax 30 93 11

**Vágur:**
Á Marknoyri
tel 37 35 35 - fax 37 35 65



demich

*… framhald frá s. 17*

takksom fyri tað verk hon, sum dagligi leiðari felagsins, hegnisliga legði úr hondum.

Hetta var eitt krevjandi tíðarskeið við broytingum og stórum nýggjum avbjóðingum, serliga tá vit hugsa um tíðina, tá eftirlønargrunnur felagsins fór at virka. Tá byrjaði eitt nýtt tíðarskeið í søgu felagsins.

## Vit eru henni takksom

Í dag kunnu vit ikki annað enn sanna, at eisini hesa uppgávuna megnaði Johanna til fulnar. Hennara arbeiði var altíð væl úr hondum greitt.

Tað hevur havt sera stóran týdning fyri felagið, og fyri limir tess. Tað er við takksemi og virðing vit minnast Johannu, og hava djúpastu samkenslu við tykkum, ið mist hava. Má hann, sum øllum valdar, veita tykkum ugga og styrki.

Við hesum fáu orðum vilja vit lýsa frið yvir minni um Johannu Hansen.

Vegna Havnar Handverkarafelag

*Eli Brimsvík, formaður.*



*Eli Brimsvík handar Johonnu gávu, og takkar fyri vælaverk, tey fimm árini hon arbeiddi fyri felagið.*



Nýtt Kall 200
Nú eisini við 200 ókeypis sms-boðum um mánaðin
Frá 1. desember hava vit gjørt fartelefonhald okkara, Kall 200, enn betri og bíligari. Umframt teir 200 ókeypis minuttirnar hvønn mánaða at nýta innanlanda, bjóða vit tær nú eisini 200 ókeypis sms-boð um mánaðin. Virði á teimum 200 sms-boðunum er 160 krónur, um tú rindar vanligan sms-takst*. Mánaðargjaldið fyri Kall 200 er 134,40 krónur. Minuttprísurin aftaná teir fyrstu 200 minuttirnar er einans 96 oyru** fyri samrøður í Føroyum. Um tú vilt hoyra meira um nýggja Kall 200 fartelefonhaldið við teimum 200 ókeypis minuttunum og teimum 200 ókeypis sms-boðum at nýta hvønn mánað, kanst tú ringja 20 20 20 og spyrja eftir einum av virkisrøktarum okkara.
Legg til merkis, at um tú hevur Kall 200 fartelefonhald frá okkum, koma tey 200 ókeypis sms-boðini av sær sjálvum á hald títt.
* Virkiskundar okkara fáa tó vanliga antin 10 ella 20% í avsláttri av listaprísinum, alt eftir, hvussu stór samlaða mánaðar-nýtslan hjá virkinum er.
** Prísurin er við 10% avsláttri. Um tú hinvegin fær 20% avsláttur er minutt-taksturin aftaná fyrstu 200 minuttirnar einans 73 oyru.
Allir prísirnir eru uttan meirvirðisgjald
TEAM85
Kall • Óðinshædd 2 • 100 Tórshavn • Tel 20 20 20
www.kall.fo
kall
20 20 20

*… framhald frá síðu 21*

Men av tí, at alt er lagt væl til rættis, so er hetta ikki nakar trupulleiki sum er. Vit hava ein mann, sum burturav tekur sær av samskiftinum, og tað hevur riggað væl. Tað er Johan M. Jacobsen, stálformaður, sum tekur sær av hesum.

Alt arbeiði liggur í eini fastari legu, so tað er ongin trupulleiki.

Men sum sagt, so haldi eg, at vit skuldu fingið teir at lagt okkum lag á, so vit í framtíðini sjálvir kundu gjørt hetta arbeiði líka væl sum teir.

## Teir trívast væl

Eg haldi, at pólendingarnir trívast væl her á Skála, sigur Sylverius. Teir flestu búgva umborð á skipinum, sum liggur við bryggju á Skála. Har er pláss til 34 mans. Men so hevur Skipasmiðjan eisini eini hús, har 10 kunnu búgva. Men teir eru sjáldan so nógvir.

Av og á vitjar leiðslan á skipasmiðjuni í Pólandi á Skála.

Í frítíðini brúka teir ítróttarhøllina á Skála, og teir spæla eisini fótbólt á graslíkisvøllinum. Teir eru katolikkar, og koma ikki í kirkju á Skála, men eg havi frætt, at pólendingar, sum eru í Havn fara í katólsku kirkjuna í Havn.

## Fór í læru í 1970

Sylverius er ættaður úr Leirvík. Hann fór í smiðjulæru á Skála Skipasmiðju 1. mars 1970. Frammanundan gekk hann í realskúla í Fuglafirði í 1$^1/_2$ ár. Men har fann hann útav, at realskúlin ikki var tann rætta leiðin hjá honum. Hann vildi heldur sleppa í læru.

Hann greiðir frá, at fyrsta skeiðið hjá honum í Tekniska Skúla nevndu teir forskúli, sum var 12 vikur. Seinni vóru 4 styttri skúlaskeið.

Tá hevði Tekniski skúli undirvísingarhøli Yviri við Strond. Meðan hann gekk í skúla búði hann hjá eini mostir í Havn.

Sylverius varð útlærdur 1. mars 1974. Og at enda nevnir Sylverius, at undan honum var Johan Lervig smiðjumeistari, og nú hann leggur frá sær verður Kári Weihe smiðjumeistari.



*Lærlingar á myndini frá vinstru: Johan Hendrik Jørgensen, Sylverius Jacobsen, smiðjuformaður, Jákup Andreasen, Hjalti Kristiansson, Jákup B. Jakobsen, Dan Andreasen, Andrias Joensen.*

… framhald frá síðu 4

## Nýbygningurin Thor Alpha

Í sambandi við sjósetingina 21. juli vóru eini 200 fólk samankomin á Skála.

Um 10-tíðina, fyrrapartin, kom skrokkurin úr byggihøllini á vogni og helt beina kós út á sjógv. Skrokkurin var sleipaður til bryggjukantin har hann skal gerast liðugur. Sigast kann, at sjósetingin gekk sum eftir bókini.

Thor Alpha verður bygdur til at veita skipum, sum skjóta seismikk allar neyðugar tænastur. Nakrar av tænastunum eru at veita tung- og dieselolju, drekkivatn og proviant.

Umframt manning – 6 mans – er pláss til 10 ferðafólk umborð. Tað vil siga, at manningin kann hava t.d. maka og børn við umborð; tey kunnu í mesta lagi vera 10.

Ein av tænastunum hjá skipinum verður at flyta sjófólk av og til skip, sum skjóta seismikk. Umborð er pláss til 34 sjófólk.

Hetta skipaslagið verður nevnt Suport/Chase skip. Thor Alpha verður ætlandi latin reiðarínum í november í ár. Skipið verður skrásett í Føroyum og verður heimahoyrandi í Hósvík.

**Støddir:**
Mesta longd: 55,10 m
Longd millum loddlinjur: 50,11 m
Breidd: 12,50 m
Dýpi til høvuðsdekk: 5,50 m
Bandarúm: 0,60 m
Brutto tonsatal: 1030 BT
Netto tonsatal: 430 NT

**Skipið lastar og bunkrar:**
Tungolju: 998 m3
Dieselolju: 550 m3
Vatn: 50 m3

**Ferð:** (royndartúr)
Við Azimuth-skrúvum: 13,0 sm/t.
Við Pump-Jet: 4,5 sm/t.
Klassi: DNV + 1A1 E0 SF

Framman verður skipið útgjørt við pumpjet framdrívsskipan av slagnum Schottel Pump Jet (SPJ 82 RDL). Við hesi skipan kann skipið sigla 4,5 sjómíl/tíma.

… framhald á síðu 30



# Hvat gert tú við tínar pengar

Kundi tú hugsað tær at vita, hvørjar møguleikar tú hevur?
Kom inn til okkara og fá eitt prát. Í felag finna vit útav, hvørjar
íløgur hóska tær best. Tað er einfaldari, enn tú trýrt.




ALT INNAN VENTILATIÓN, HITA OG SANITET
TLF: 31 20 00
Maria Poulsen p/f
www.mariapoulsen.fo


El-amboð
til handverkaran?
Balslev
sjálvandi!
Paslode
makita
metabo
ELEKTRA BECKUM
Tel 31 11 22
www.balslev.fo

… framhald frá síðu 26

Tvær eldrivnar azimuth-skrúvur verða ísettar í thrustara rúmunum.

Azimuth-skrúvurnar eru av slagnum Aquamaster, við 650 kW inngangandi effekt á hvørja skrúvu.

Til streymveiting verða ísett 4 stk. aggregat av slagnum Nordhavn typa GASI 16-07, 440 kW, 3 x 440 Volt, 60 Hz.

Motorarnir eru Scania typa DI16 44M, 469 kW við 1800 snúningum/-min. og generatorarnir, ið verða veittir av SES, eru Marelli typa MJBM 355 MB4. Framdrívskipanin er diesel elektrisk.

Skipið skal vera væl egnað sum „Support/Chase" í alheims sigling, og fyrilit skal takast fyri arbeiðsumhvørvi, trivnaði og trygd umborð, umframt at skipið skal lúka umhvørviskrøv so sum útlat frá motorum v.m.



Skipið verður smíðað við einum heilum gjøgnumgangandi dekki, og bakkadekki, sum strekkir seg yvir umleið hálva skipslongd.

## Gunnar Mohr, stjóri

Gunanr Mohr, stjóri á Skipasmiðjuni, sigur, at tað er ein stórur fyrimunur hjá teimum at hava nýggj skip at byggja, tí tað er støðugt og langsigtað arbeiði.

Umvælingararbeiðini eru hinvegin meiri skiftandi og stuttskygd, men saman við nýbygging er munandi lættari at leggja virksemi til rættis, og at brúka tøku orkuna betri.

Gunnar sigur, at tað er avtalan við Landsfelag Handverkaranna um útlendska arbeiðsmegi, sum ger, at tað aftur ber til at byggja skip í Føroyum, og hann vónar, at føroyskt skipasmíð nú er komið fyri at vera.

Við verandi sáttmálum hevur Skipasmiðjan skipasmíð fram til september 2008, tá seinna veitingarskipið til Thor í Hósvík skal latast eigarunum.

## Nýbygningar

Á Skipasmiðjuni arbeiða tey alla tíðina við at fáa fleiri nýggj skip at byggja, men enn er einki ítøkiligt á borðinum.

Vit kanna alla tíðina møguleikarnar og fáa eisini fyrispurningar, men enn er kortini onki endaligt, sigur Gunnar.

Hóast Skipasmiðjan kann tykjast at vera ein risi, tá talan er um skipasmíð og smiðjuarbeiði í Føroyum, so merkja tey kortini væl kappingina frá øðrum veitarum.

## Umvælingar

Nógvar av umvælingunum verða gjørdar meðan skipini liggja við bryggju, og tá eru fleiri um boðið at gera arbeiði, og vit merkja væl kappingina frá øðrum føroyskum smiðjum.

Tá tað kemur til størri umvælingar, eitt nú akseltrekk ber til hjá skipunum at fara uttanlands, og tí merkja vit eisini kappingina frá útlendskum skipasmiðjum.

## Hørð kapping

Hóast kappingin er hørð, bæði lokalt og frá útlendskum veitarum, so fær Skipasmiðjan eisini uppgávur frá útlendskum skipum.

Tað eru serliga russisk og íslendsk skip, sum skipasmiðjan umvælir.

Orsøkina til, at útlendsk skip koma til Føroya at verða umvæld er tekin um, at føroysku skipasmiðjurnar eru kappingarførar, tá talan er um prís og dygd.

Harafturat kemur, at fleiri russisk skip eru javnan í Føroyum og umskipa veiðina, og tá kemur fyri, at tey velja at fáa umvælingar gjørdar í Føroyum samstundis.

## Íslendsk skip

Hvat íslendskum skipum viðvíkur, so eru tað serliga skip av Eysturlandinum, sum koma til Føroya. Av Eysturlandinum er líka skjótt at sigla til Føroyar, sum til Akureyrar ella Reykjavíkar.

Tí velja tey at koma til okkara í staðin.

Gunnar Mohr hevur góðar vónir um, at nógva virksemi fer at halda fram, men ger samstundis vart við trupulleikan at fáa nóg mikið av arbeiðsfólki við røttu førleikunum til Føroya.

Audi
SEAT
PORSCHE

**Bilasølan**
við Øssur Johannesen
Vegurin Langi · 188 Hoyvík · tlf. 31 53 54 · www.audi-vw.net



# Vit geva tær betri ráð

FØROYA BANKI